Undirskrift formansins:_____

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 23.03.2023 kl. 17:30
Málnr.: 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir: Terja Ó. Sivertsen møtti fyri Tummas J. Lervig
Ikki møtt:
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
22/23	23/00040-1	Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi, Tummas J. Lervig
23/23	22/01992-3	Mannagongdir í samband við frávik frá byggisamtykt
24/23	23/00275-2	Marknausmkipan millum matr.nr. 16a og 16b á Norðoyri
25/23	23/00287-3	Umsókn um makaskifti - matr.nr. 1137
26/23	23/00320-3	Umsókn um makaskifti - matr.nr. 37 og 22a á Strond
27/23	23/00331-3	Umsókn um makaskifti i Mikladali millum festi- og ognarjørð í Mikladali
28/23	21/01287-66	Umsókn um prinsipp byggiloyvi til nýbygging á Kirkjubrekku 3, Klaksvík
29/23	23/00336-3	Umvæling av býráðshúsinum - Tekja og útsíður
30/23	23/00174-1	Flyta íløgu til fimleikarhøll til rakstrarstaðið stuðul til ítrótt – *flyting frá íløgum til rakstur, seinna viðgerð*
31/23	23/00357-1	Eykajáttan 2023 – mars og apríl – *fyrra viðgerð*
Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum		
32/23	21/01331-56	Vinnuútstykkingin undir Hamri
33/23	21/01280-153	Arbeiðstakarasáttmáli

Til viðgerðar

22/23
23/00040-1 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi, Tummas J. Lervig

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	23.03.2023	22/23

23/00040-1 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi, Tummas J. Lervig

Frágreiðing um málið:
Tummas J. Lervig býráðslimur, hevur boðað frá, at hann hevur forfall til býráðsfundin 23. mars 2023. Næstvaldi á listanum er Terja Ósa Sivertsen

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin, § 18

Fíggjarligar avleiðingar:
Fundarsamsýning til tiltakslimin, um býráðið avger at lata hann taka sæti í býráðnum til fundin.

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til innkalling av tiltakslimi fyri Tummas J. Lervig.

Klaksvíkar Býráð 23. mars 2023:
Einmælt samtykt at lata Terju Ó. Sivertsen taka sæti í býráðnum á fundinum.

23/23
22/01992-3 Mannagongdir í samband við frávik frá byggisamtykt

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Heilsunevndin	13.03.2023	K-8/23
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.03.2023	27/23
3 Mentanarnevndin	14.03.2023	K-3/23
4 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	14.03.2023	K-9/23
5 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	14.03.2023	K-7/23
6 Havna- og Vinnunevndin	15.03.2023	K-6/23
7 Tekniska Nevnd	15.03.2023	K-13/23
8 Fíggjarnevndin	21.03.2023	25/23
9 Ferðslunevndin	13.03.2023	K-2/23
10 Klaksvíkar Býráð	23.03.2023	23/23

22/01992-3 Mannagongdir í samband við frávik frá byggisamtykt

Frágreiðing um málið:
Í samband við umsóknir, ið krevja frávik frá ásetingunum í ávísu økjunum, almennu byggisamtyktini og BK 17, skjýtur tekniska fyrisiting upp at broyta mannagongdir.

Núverandi mannagongd er, at byggimál, har søkt verður um frávik, verða løgd fyri avvarðandi nevndir, ið síðani taka støðu til, um frávik skal játtast. Um nevndin játtar fráviki, verður málið lýst og sent út til hoyring hjá teimum grannum, ið kunnu ávirkast av ætlaðu byggingini.
Avleiðingin kann verða, at grannar, ið verða hoyrdir um frávikið, koma at kenna seg kroystar, tá ið frávikið longu er játtað í avvarðandi nevnd og tískil aftra sær við at siga sína hugsan.

Uppskot til nýggja mannagongd: at koyra umsóknir um frávik til grannahoyring áðrenn nevndarviðgerð. Hetta tí, at nevndir møguliga ikki kunnu taka støði í viðurskiftum, sum tær ikki kenna ella kunnu fyrihalda seg til.
Við at senda tað til hoyring hjá grannum áðrenn nevndarviðgerð, kunnu nevndir taka meira grundaðar avgerðir til mál, við støði í grannahoyringini. Teir grannar, sum verða hoyrdir í málinum, kunnu siga sína hugsan, áðrenn nøkur avgerð er tikin, uttan at kenna seg kroystar.

Lógargrundarlag:
BK17, Almenna byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu, Økisásetingar og Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting mælir til, at nevndin tekur undir við uppskotinum frá fyrisitingini um at broyta mannagongd í samband frávik, sum omanfyri lýst.

Ferðslunevndin 13. mars 2023
Málið verið til kunningar.

Heilsunevndin 13. mars 2023:
Málið hevur verið til kunningar, dagfest 13-03-2023

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. mars 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-03-2023.

Mentanarnevndin 14. mars 2023:
Málið verið til kunning, dagf. 14-03-2023.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 14. mars 2023:
Málið verið til kunning.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 14. mars 2023:
Málið verið til kunning.

Havna- og Vinnunevndin 15. mars 2023:
Málið verið til kunning, dagf. 15-03-2023.

Tekniska Nevnd 15. mars 2023:
Málið verið til kunning, dagf. 15-03-2023.

Fíggjarnevndin 21. mars 2023:
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 13-03-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. mars 2023:
Tilmælið frá FíN 21. mars 2023 einmælt samtykt.

24/23
23/00275-2 Marknausmkipan millum matr.nr. 16a og 16b á Norðoyri

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.03.2023	28/23
2 Klaksvíkar Býráð	23.03.2023	24/23
3 Norðoyrarnevndin	02.05.2023	

23/00275-2 Marknausmkipan millum matr.nr. 16a og 16b á Norðoyri

Frágreiðing um málið:
Víst verður til umsókn frá eigaranum av matr.nr. 16a og 16b á Norðoyri um at víðka matr.nr. 16b 1 metur longur oman.

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi

Tilmæli:
Tekniska Fyristing mælir til at viðmæla umsóknini.
Av tí at talan er um smámunaligt mál, verður mælt til, at umsóknin verður avgreidd hetta fundarumfarið og eftirfylgjandi latin Norðoyrarnevndini til kunningar til regluliga fundin í mai 2023

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. mars 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-03-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. mars 2023:
Tilmælið frá UBN 13. mars 2023 einmælt samtykt.

25/23
23/00287-3 Umsókn um makaskifti - matr.nr. 1137

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.03.2023	29/23
2 Tekniska Nevnd	15.03.2023	20/23
3 Fíggjarnevndin	21.03.2023	26/23
4 Klaksvíkar Býráð	23.03.2023	25/23

23/00287-3 Umsókn um makaskifti - matr.nr. 1137

Frágreiðing um málið:
Í framhaldi av samskiftinum við eigaran av matr.nr. 1137 um at lata lendi til atkomuveg omanfyri Stangavegin, spyr umboðsmaður eigarans um møguleikan fyri at makaskifta lendið til ætlaða vegin suðurúr parkeringsplássinum við lendið norðanfyri matr.nr. 1137, heldur enn at lata lendi til vegin við vanligari sølu.
Grundgevingin er ynski um møguleika fyri at byggja sær bilhús norðanfyri sethúsini.
Makaskifti snýr seg um uml. 80 m^2.

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til málið:
Byggisamtyktin:
Økið norðanfyri matr.nr. 1137 liggur í økisparti D18 (fríøki). - Makaskifti við matr.nr. 1137, við bygging av bilhúsi fyri eyga, krevur regulering í økismarkinum, samsvarandi broyttum matrikulmarki.
Ognarviðurskifti:
Norðanfyri matr.nr. 1137 eru ognirnar skrásettar sum matr.nr. 1644, eigari Klaksvíkar Kommuna og litra A (Ravnagil – almenn ogn).
Teknisk viðurskifti:
Talan er um innlokaða á, sum má flytast. Býarverkfrøðingurin upplýsir, at hetta arbeiði er partur av projektinum: *Parkeringsætlan niðanfyri raðhúsini við Stangaveg*. Sí viðheft skjal 1
Projektið leggur upp til ein stikkveg niðanúr ætlaða atkomuvegin suðureftir. Hesin vegur forðar fyri, at umsøknin til fulnar kann vera játtað – tó er pláss fyri partvísum makaskifti (uml. 45 m^2).. – Sí tekning niðanfyri:

Skraverað við reyðum: lendið til veg av matr.nr. 1137
Skraverað við gulum + brúnum: umsøkjarans ynski um makaskifti
Skraverað við brúnum: lendi, sum Tekn.Ums. kann viðmæla av makaskifta

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Býarskipanarlógin
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar útyvir tað, sum at sett av til parkeringsætlanina við Stangaveg

Tilmæli:
Tekniska Umsiting hevur onki í móti at viðmæla makaskifti millum matr.nr. 1137 í tann mun, samtykta parkeringsætlan loyvir tí (trygd má tó vera fyri, at KK hevur ræðisrættin á litra A (ánni). Umhvørvisstovan kannar hesi viðurskifti í løtuni).
Kunnað verður um, at verður makaskiftið samtykt, útloysir tað samstundis kravið um regulering av byggisamtyktarmarkinum millum økispart D18 og A10, og flyting av innilokaðu ánni.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. mars 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-03-2023.

Tekniska Nevnd 15. mars 2023:
Nevndin tekur undir til UBN, dagf. 13-03-2023.

Fíggjarnevndin 21. mars 2023:
Nevndin tekur undir við TN, dagf. 15-03-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. mars 2023:
Tilmælið frá FíN 21. mars 2023 einmælt samtykt.

26/23
23/00320-3 Umsókn um makaskifti - matr.nr. 37 og 22a á Strond

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.03.2023	32/23
2 Klaksvíkar Býráð	23.03.2023	26/23
3 Ánanevndin	02.05.2023	

23/00320-3 Umsókn um makaskifti - matr.nr. 37 og 22a á Strond

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður tann 1. mars 2023 um kommununnar ummæli til marknaumskipan millum omanfyri nevndu matriklar á Strond.
Byggisamtyktarliga er talan um økispart G (landbúnaðarendmál)



Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi

Tilmæli:
Tekniska Umsiting hevur ikki aðrar viðmerkingar til umsóknini, enn at makaskiftið verður treytað av, at vegrættur verður tinglisin gjøgnum matr.nr. 22a sum atkoma til matr.nr. 37. – Ognirnar liggja uppat landsvegi, - tí krevst eisini ummæli frá Landsverk.
Av tí at talan er um smámunaligt mál, verður mælt til, at umsóknin verður avgreidd hetta fundarumfarið og eftirfylgjandi latin Ánanevndini til kunningar til regluliga fundin í mai 23.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. mars 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-03-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. mars 2023:
Tilmælið frá UBN 13. mars 2023 einmælt samtykt.

27/23
23/00331-3 Umsókn um makaskifti i Mikladali millum festi- og ognarjørð í Mikladali

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.03.2023	33/23
2 Klaksvíkar Býráð	23.03.2023	27/23
3 Mikladalsnevndin	03.05.2023	

23/00331-3 Umsókn um makaskifti i Mikladali millum festi- og ognarjørð í Mikladali

Frágreiðing um málið:
Víst verður til e-post frá Búnaðarstovuni dagf. 1. mars 2023, har biðið verður um kommununnar ummæli til at makaskifta 5 ha av festinum matr.nr. 120d (harav festiparturin er matr.nr. 17a) í Mikladali við uml. 9-15.000 m^2 ognarjørð (matr.nr. 3a í Mikladali). Endamálið við makaskiftinum er nývelting á festijørðini. Búnaðarstovan viðmælir ætlanina.

Í telefonini 2. mars upplýsir ognarin og festarin, at málið hevur skund og vónar hann, at kommunan kann avgreiða sítt ummæli sum skjótast.

Umsøkjarin hevur sjálvur víst á 3 uppskot til part av makaskifta – si mynd niðanfyri



Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 194 frá 23. desember 2018
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi

Tilmæli:
Tekniska Umsiting sær ikki nakra forðing fyri umsókta makaskifti.

Havandi í huga byggisamtyktarligu ásetingina fyri matr.nr. 120d (landbúnaðarendamál) síggja uppskot 3 og ovari partur av uppskoti 2 tó út sum tey mest sambæriligu. - Sí greining av byggisamtyktarligu ásetingunum fyri uppskot 1, 2 og 3 niðanfyri:

uppskot 1: Økisparti A26 (blandað bygging)
niðari partur av uppskoti 2: Økispartur C15 (almenn endamál), meðan
ovari partur av uppskoti 2: landbúnaðarøki
uppskot 3: landbúnaðarøki.

Nevndin verður samstundis at taka støðu til ynski umsøkjarans um at avgreiða málið víðari til Búnaðarstovuna eftir hetta fundarumfarið, og at Mikladalsnevndin eftirfylgjandi verður kunnað á fyrsta regluliga fundi, sum verður í mai 2023.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. mars 2023:
Nevndin tekur undir við uppskot 3, og at málið veður avgreitt víðari til búnaðarstovuna eftir hetta nevndarumfar, dagf. 06-03-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. mars 2023:
Tilmælið frá UBN 13. mars 2023 einmælt samtykt.

28/23
21/01287-66 Umsókn um prinsipp byggiloyvi til nýbygging á Kirkjubrekku 3, Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	13.03.2023	14/23
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.03.2023	25/23
3 Tekniska Nevnd	15.03.2023	15/23
4 Klaksvíkar Býráð	23.03.2023	28/23

21/01287-66 Umsókn um prinsipp byggiloyvi til nýbygging á Kirkjubrekku 3, Klaksvík

Frágreiðing um málið:
Teknistovan Kontrast søkir vegna eigara av matr.nr. 607 um prinsippbyggiloyvi til handils-, skrivstovu- og íbúðabygning.
Bygningurin verður soleiðis innrættaður: 2 íbúðir á ovastu hædd, skrivstova á miðhædd og handil í veghædd, somuleiðis verður søkt um frávík innan ábygging og parkering.
Sí faldara *skipanaruppskot* og mailsamskift *SV_ Umsókn um prinsipp byggiloyvi til nýbygging á Kirkjubrekku 3, Klaksvík.msg.* Uppruna umsóknin er somuleiðis hjáløgd.

Umsóknin víkir frá ásetingunum innan ábygging og parkering, sum eru lýst niðanfyri:

- Ábygging

• A8 max	45%
• Grundstykki	498 m2
• Ábygging út frá støðumynd	259 m2
• % ábygging =	52%
• **Frávik á**	**7%**

Útrokningin fyri ábygging tekur støði í økisásetingunum fyri A8, ið loyvir ábygging á 45%.

- Parkeringskrav

• Ovasta hædd/2. hædd (2 íbúðir)	3 parkeringspláss
• Miðhædd/1. hædd (skrivstova)	5,2 parkeringspláss
• Veghædd	5,6 parkeringspláss
• Samlað krav til parkering	13,8 > 14 parkeringspláss
• **Frávik á**	**9 parkeringspláss**

Vísandi til innsendu støðumynd vísir umsøkjari til 8 parkeringspláss á matriklinum. 3 parkeringspláss eru staðsett framvið bygninginum, og eru treytað av, at áin (matr.nr. c) verður nýtt sum farbreyt. Síðani eru 5 parkeringspláss staðsett út móti Kirkjubrekku.

Umsitingin metir ikki, at tað ber til at taka útgangsstøði í ferðsluatkomu og parkering eftir verandi áarloki (matr.nr. c), tí staðfest er, at áarlokið má umvælast (helst má áin leggjast av nýggjum), um tað skal nýtast sum farleið, og útkoyringin er ikki ferðsluliga hóskandi. Umvæling av áarlokinum (ella nýgerð av ánni) er ikki raðfest innan fíggjarætlanina 2023.
Tískil fær umsøkjari víst á 5 ítøkilig parkeringspláss (út móti Kirkjubrekku). Hetta gevur eitt frávik á 9 parkeringspláss vísandi til kravið um 14 parkeringspláss sambært nýtslu.



Støðumynd

Somuleiðis er umsitingin varug við, at altanir eru á norðursíðuni, ið eru nærri granna enn loyvdu 2,5 m. Men hesum hevur umsitingin umrøtt við umsøkjara, og verða altanirnar trekt inn ísb. við eitt komandi myndugleikasettið.

Verður frávik latið, fer fyrisitingin at fyrireika málið til grannahoyring og leggur málið fyri nevnd eitt av komandi umførunum.

Hjáløgd er samtykt frá TN 15. feb. 2023.

Lógargrundarlag:
Ásetingar fyri øki A8, Almenna byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu og BK 17

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting mælir frá at loyva frávik og mælir í staðin til, at bygt verður innan ásetingarnar.

Ferðslunevndin 13. mars 2023:
Viðv. ferðsluliga partinum av málinum: Nevndin er greið yvir at frávikið sambært umsóknini er stórt, tá Vágsáin sum koyrivegur og til parkering ikki verður tald uppí, men staðfest verður samstundis, at stórt tal av parkeringsplássum er í miðstaðarøkinum, og fleiri eru í umbúna.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. mars 2023:
Ein meirluti GvK, OáL, ASB og JS tekur undir við at geva frávik til talið av parkeringsplássum og at ábygging verður innan galdandi reglur.
Ein minniluti SVJ tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-03-2023.

Tekniska Nevnd 15. mars 2023:
Ein meirluti OáL, EyÓP, ÓML og TL taka undir við meirlutanum í UBN dagf. 13.03.2023.
Ein minniluti ASJ tekur støðu til komandi býráðsfund í mars.

Klaksvíkar Býráð 23. mars 2023:
Atkvøtt varð um meirilutatilmælini frá UBN 13-03-2023 og TN 15-03-2023; tey fullu við 5 atkvøðum fyri (GvK, OáL, EÓP, JS og ÓML) og 6 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, JCC, ASB, SVJ og TÓS).

29/23
23/00336-3 Umvæling av býráðshúsinum - Tekja og útsíður

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.03.2023	34/23
2 Fíggjarnevndin	21.03.2023	29/23
3 Klaksvíkar Býráð	23.03.2023	29/23

23/00336-3 Umvæling av býráðshúsinum - Tekja og útsíður

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 6. mars 2023, verður greitt nærri frá málinum um eina møguliga dagføring av klimaskerminum á býráðshúsinum.

Bygningurin ber brá av aldri og sliti, umframt at staðfest er, at væta seyrar inn ígjøgnum betongskjøldurin suðureftir, við hartil hoyrandi vanda fyri blámusoppi.
Tekjan er í sera ringum standi og tað er alneyðugt at ábøtur verða gjørdar. Annars kann stórur skaði koma á aðrar bygningslutur og ávirka virksemi í húsinum

Fyri fíggjarætlanina 2023 eru 2 mio. kr. settar av til *fastogn.* Hesar eru oyramerktar til viðlíkahald av býráðsshúsinum.

Umsitingin mælir tí til, at arbeitt verður á tekju og suðurskjøldri á bygninginum í 2023. Meðan restin verður gjørt í 2024-2026.

Fyrisitingin hevur valt at vísa á tvey uppskot, ið mett verður eru hóskandi til bygningin.

Uppskot 1.

Seinna uppskotið leggur upp til eina meira modernaða útsjónd. Har framsíðan móti Nólsoyar Pálsgøtu verður latin upp við størri vindeygaparti. Bygningurin verður klæddur við sløttum gulelokseraðum aluminiumsplátum – hetta er ein snøgg, tøkniliga dygg og haldfør loysn.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
2 mio. kr. eru settar av íløgum fastogn.
100 tkr. eru nýttur av teimum 2 mió. kr. til arkitekta ráðgeving.

Øll verkætlanin yvir ár:
Uml. 6,7. mio. kr til dagføring av øllum klimaskermi og tekju.

Tilmæli:
Umsitingin heitir býráði at viðgera uppskotini, og vísa á hvørja loysn umsitingin skal arbeiða víðari við. Eftir tað vil umsitingin venda aftur við eini fullfíggjari kostnaðarmeting fyri tekju og suðurskjølur, og arbeiðs- fíggjarætlan yvir ár (2026).

Umhvørvis- og býarskipanarnevndin 13. Mars 2023:
Ein meirluti, GvK, OáL og ASB taka undir við uppskoti eitt og at prosjekteringsarbeiði verður gjørt uttanhhýsis. Ein minniluti SVJ og JS taka støðu í býráðnum.

Fíggjarnevndin 21. Mars 2023:
Ein minniluti tekur undir við uppskoti eitt og at projekteringsarbeiðið verður gjørt innanhýsis, og at utaanhýsis hjálp verður nýtt eftir tørvi.
Ein meiriluti OáL, JS og SVJ tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 23. mars 2023:
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá JS: "*Mælt verður til, at peningurin heldur verður brúktur til Ung í Arbeiði, og neyðugar ábøtur annars verða gjødar við bygningin*"; tað fall við 1 atkvøðu fyri (JS) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB); ÓML, SVJ og TÓS atkvøddu ikki.

Síðani varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá KHJ: "*Mælt verður til at taka undir við uppskoti 1, og at umsitingin fær heimild til at biðja eigaran av uppskotinum um at koma við eini fullfíggjari kostnaðarmeting fyri tekju og skjøldur og einari arbeiðs- og fíggjarætlan yvir ár (2026)";* tað varð samtykt við 10 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, ASB, ÓML, SVJ og TÓS) og ongari atkvøðu ímóti; JS atkvøddi ikki.

30/23
23/00174-1 Flyta íløgu til fimleikarhøll til rakstrarstaðið stuðul til ítrótt– *flyting frá íløgum til rakstur, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	14.02.2023	5/23
2 Fíggjarnevndin	21.02.2023	8/23
3 Klaksvíkar Býráð	23.02.2023	20/23
4 Klaksvíkar Býráð	23.03.2023	30/23

23/00174-1 Flyta íløgu til fimleikarhøll til rakstrarstaðið stuðul til ítrótt

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 23. feb. 2023.

Lógargrundarlag:
Fíggjarætlan 2023

Fíggjarligar avleiðingar:
Kr. 450.000 verða fluttar frá íløgum til rakstur.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndin tekur undir við at flyta íløgujáttanina til fimleikarhøll til raksturin m.a. til at stuðla Fimleikarfelagnum við leigukostnaði og dagføringum av bygningi.

Mentanarnevndin 14. februar 2023:
Ein meirluti, GvK, ASB, ÓL og JC taka undir við tilmælinum, dagf. 05-02-2023
Ein minniluti, SVJ, tekur støðu á komandi býráðsfund.

Fíggjarnevndin 21. februar 2023:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við meirilutanum í MeN 14-02-2023.
Ein minniluti, TJL og JS, mælir til at halda fast við, at kr. 450.000 verða settar av til íløgur til tekning/projektering av fimleikarhøll, og mælir til at onnur játtan verður fingin til vega til fyribilshølir til Fimleikafelagið.

Klaksvíkar Býráð 23. februar 2023:
Atkvøtt varð um minnilutatilmælið frá FíN 21-02-2023; tað fall við 3 atkvøðum fyri (JS, SVJ og TJL) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB); ÓML atkvøddi ikki.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá FíN 21-02-2023; tað varð einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 23. mars 2023:
Atkvøtt varð um býráðssamtyktina frá 23. feb. 2023; hon varð einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

31/23
23/00357-1 Eykajáttan 2023 – mars og apríl – *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Heilsunevndin	13.03.2023	10/23
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.03.2023	35/23
3 Mentanarnevndin	14.03.2023	21/23
4 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	14.03.2023	10/23
5 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	14.03.2023	7/23
6 Havna- og Vinnunevndin	15.03.2023	17/23
7 Tekniska Nevnd	15.03.2023	22/23
8 Fíggjarnevndin	21.03.2023	22/23
9 Klaksvíkar Býráð	23.03.2023	31/23
10 Klaksvíkar Býráð	27.04.2023	

23/00357-1 Eykajáttan 2023 – mars og apríl

Frágreiðing um málið:
Við hesum verða eykajáttanir lagdar fyri nevndir og býráð til viðgerðar og støðutakan.
Roknskapurin fyri 2022 vísir í dag 58,3 mió. kr. í halli. Ein meting er gjørd av rokningunum, sum eftir eru at bóka. Tann upphæddin er mett til netto 2,4 mió. kr., og við hesum verður hallið 60,7 mió. kr. Víst verður til fylgisskjal 1, har rokningarnar, sum eru eftir at bóka, eru nærri útgreinaðar.

Roknskapur pr. 2022 + ávegis rokningar (útskrivað 01-03-2023)											
1000.kr.		Uppruna-ætlan	Eyka-játtanir	Dagførd ætlan	R 2022 (01 03-2023)	Rokningar eftir at bóka	Meting R2022	Pct.	Æ 2023 samtykt 24. nov 2022	Æ 2024 (inntøkur og útr hækka 3,5%	Æ 2025 (inntøkur og útr hækka 3,5%
§ 20	Inntøkur	310.000	0	310.000	315.360	0	315.360	101,7	328.876	340.387	352.300
§ 1-7.	Rakstur	242.476	500	242.976	245.537	658	246.195	101,3	254.898	263.819	273.053
		67.524	500	67.024	69.823	-658	69.165	103,2	73.978	76.568	79.247
§ 1-7.	Íløgur	78.400	18.100	96.500	118.774	1.751	120.524	124,9	51.700	43.368	46.047
		-10.876	18.600	-29.476	-48.951	-2.409	-51.360	174,2	22.278	33.200	33.200
§ 20	Rentustuðul	3.800	0	3.800	4.097		4.097	107,8	4.000	4.200	4.200
		-14.676	18.600	-33.276	-53.048	-2.409	-55.457	166,7	18.278	29.000	29.000
§ 20	Rentur	4.200	0	4.200	5.326		5.326	126,8	8.200	8.153	7.689
	Úrslit áðrenn avdráttir	**-18.876**	**18.600**	**-37.476**	**-58.374**	**-2.409**	**-60.783**	**162,2**	**10.078**	**20.847**	**21.311**

Gjaldførið
Gjaldførið er roknað til 40 mió. kr. Kommunan eigur at hava einar 20 mió. kr. at arbeiða við. Kommunan hevur sostatt tryggjað sær gjaldførið árið út.

Víst verður á, at talan er um fleiri fíggjarligar íløgubindingar komandi árini, t.d. lendisarbeiði viðv hotellverkætlanini, spillivatnsætlan, nýggi húsarhaldsskúlin, vegur og parkeringspláss við Stangavegin.

Eykajáttanir
Nú vit gjøgnumganga roknskapin fyri 2022 kunnu vit staðfesta, at nýtslan er væl størri enn avsett. Dagførda fíggjarætlanin vísir 37,4 mió. kr. í halli, meðan fyribils roknskapurin vísir 60,7 mió. kr. í halli. Munurin er 23 mió. kr. Tað eru tó rakstrarstøð, sum hava avlop.
Samlaða upphæddin í hesum eykajáttanaryvirlitinum er 28,6 mió. kr.

Av tí at gjaldførið er avmarkað, nettoskuldin er oman fyri eina álíkning, nýtslan 2022 er 23 mió. kr størri enn avsett, ber ikki til at brúka hugtakið framflytingar. Um ynski eru at brúka meira pening av enn avsett í fíggjarætlanini 2023, skal eykajáttan samtykkjast. Hetta er eisini galdandi fyri sokallaðar“framflytingar”.

Eykajáttanir skulu hava tvær viðgerðir í býráðnum, og landsstýrið skal kunnast um samtyktirnar.

Um kommunan skal brúka av gjaldførinum, eigur at verða hugt eftir, um avsetingarnar i fíggjarætlanini fara at halda, og hvørjar avleiðingar hetta hevur fyri langtíðarætlanina. Víst verður her til málið 23/00233 Bankaskuld – afturgjaldsætlan, har býráðið samtykti, at 2024-2028 skal kommunan árliga rinda 29 mió. kr. í lánsgjøldum.

Um vit taka dømi 1 í nevnda máli, har roknað verður við, at inntøkur og rakstur hækka 3,5%, verða íløgurnar í 2024 og 2025 ávikavist 43 og 46 mió. kr. (sí talvuna omanfyri).
Tí er umráðandi, at hugt verður eftir kommunalu bindingunum, tá eykajáttanirnar verða viðgjørdar. Hetta er serliga galdandi, um eykajáttanin merkir, at hon eisini krevur játtan næstu árini.

Møguligar eykajáttanir eiga at verða fíggjaðar við meirinntøkum ella sparingum/umraðfestingum, tí annars hækkar nettoskuldin.
Um vit fylgja fíggjarætlanini 2023, verður nettoskuldin ultimo 2023 uml. 60 mió. kr. oman fyri loyvda skuldarmark.
Víst verður eisini til skriv frá Fíggjarmálaráðnum, har lántøkurnar eru treytaðar av, at kommunan kemur undir skuldarmarkið ultimo 2024.

Um kommunan samtykkir eykajáttanir uttan meirinntøkur/sparingar/umraðfestingar, verður torførari at røkka málinum at koma undir skuldarmarkið í 2024.
Meirinntøkurnar kunnu t.d. koma frá sølu av grundstykkjum og hækking í skattainntøkunum.

Ein møguleiki er at hækka skattaprosentið, men hetta er neyvan ráðiligt, sum tíðirnar eru við prísvøkstri og hækkandi rentu. Eitt skattaprosent gevur uml. 11,5 mió. kr.

Inntøkurnar frá persónsskatti hava verið serstakliga góðar – meirinntøkan januar-februar er 3,4 mió. kr. ella 9,4%. Í fíggjarætlanini er vøksturin mettur til 3,6%.

Ilt er at siga, hvussu grundstykkjasølan verður, nú rentan er hækkað, og tí eigur ein at verða varin at rokna við hesum pengunum.

Um vit brúka meira enn játtað í 2023 uttan meirinntøkur/sparingar/umraðfestingar, og landsstýrið heldur fast við kravið um, at nettoskuldin skal verða undir eina álíkning ultimo 2024, fer kommunan at hava stórar avbjóðingar næstu árini.

Um inntøkurnar verða eins góðar sum í januar-februar, og landsstýrið hækkar skuldarloftið, broytist myndin, og tað gerst lættari at fremja ætlaðu verkætlanir.

Tí er umráðandi, at eykajáttanirnar fáa eina neyva viðgerð. Hetta er sum nevnt 1. viðgerð og 2. viðgerð verður væntandi í apríl.

Havandi í huga fyritreytirnar, sum lýstar eru omanfyri, verður mælt til at samtykkja bara tær eykajáttanir, sum eru neyðugar.

Ymisku økini:

Her er stutt lýsing av eykajáttanunum, sum verða lagdar fyri nevndirnar hetta umfarið. Uppgerðin vísir samanlagt 28,6 mió. kr. í eykajáttanum, men rúm er ikki fyri øllum hesum í 2023, og tí er neyðugt hjá politisku skipanini at raðfesta.

Grein	Eldri& bústaðir	Børn & ung	MeN	UBN	TN	Ha&ViN	Ialt
Grein 1							
Grein 2							
NBH	3.825						
Grein 3							
Fjallafípan - uttanum økið		400					
Grein 4							
Skúlatrøð - trappur v.m.		115					
Grein 5							
Svimjihøllin (hitavekslari)			630				
Hornaskýlið			2.600				
Rennibreytin			1.000				
Dypparaneystið			400				
Grein 6							
Útstykking á Fossum				16.000			
Sveisirúm					550		
Grein 7							
Bátahylur Árnafirði						3.400	
Samanlagt	**3.825**	**515**	**4.630**	**16.000**	**550**	**3.400**	**28.920**

<u>Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin</u>

<u>Útstykking á Fossum</u>

Tørvurin til at gera byggistig 1 liðugt er tilsamans 26 mió kr., 10 mió. kr eru settar av á fíggjarætlanini 2023. Tað merkir, at 16 mió. kr. mangla í til at fremja verkætlanina.
Vísandi til mál nr. 21/01280-153, verður mælt til varsemi í samband við at rokna við inntøkum frá sølu av grundstykkjum. Restupphædd skal eykajáttast. Um gongst sum ætlað, verður søluinntøkan tils. 12 mió. Um hetta verður úrslitið, er neyðugt við 4 mió. kr í eykajáttan.

<u>Mentanarnevndin</u>

<u>Hornaskýlið við Djúpumýru</u>

2,6 mió. kr av játtanini í 2022 blivu ikki brúktar, umframt at 2,0 mió. kr. eru játtaðar í 2023. Hartil kemur ein stuðul frá FSF áljóðandi 900.000 kr. Tils. skulu 5,5 mió. kr. játtast í 2023. Í 2024 verður neyðugt at brúka knappar 5 mió. kr og tað sama í 2025. Eykajáttanartørvurin er tí 2,6 mió. kr.
Tað bleiv samtykt á fundi FíN hin 21. februar, at verkætlanin skal fremjast í trý ár. Ein fyritreyt fyri undantaksloyvinum, sum Klaksvíkar kommuna hevur frá UEFA er, at gongd er í málinum.

Dypparaneystið Borðoyarvík
Játtan á 400.000 kr. bleiv ikki brúkt í 2022, tí arbeiðið varð seinkað. Farið er í gongd við at fyrireika byggingina.
Tað er samtykt av býráðnum at fremja verkætlanina.

Leikvøllurin við Másheyg (rennibreytin)
Tørvurin í 2023 er mettur at vera 1 mió kr. Hetta er til montering av útgerð til rennibreytina, og til ljósini (innstilling og avskerming/ljósdálking). Hetta var ikki við í prosjektinum.

Hitavekslari (svimjihøllin)
Óbrúkta játtanin í 2022 er kr. 630.841,- sum er sett av til nýggjan hitavekslara. Hitavekslarin bleiv bílagdur til levering í desember 2022, men verður væntandi ikki leveraður fyrr enn juni 2023. Mett verður, at hitavekslarin gevur eina árliga sparing á 100.000 kr. í orkunýtslu. Mælt verður til at óbrúkta játtanin verður eykajáttað í 2023.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung
Uttanumøkið við dagstovnin Fjallafípan
Mett verður, at tað kostar 400.000 kr. at gera uttanumøkið við Fjallafípuna.
Roynt verður at gagnnýta leikur frá øðrum verkætlanum (avlop) og flisar frá øðrum verkætlanum, men tørvur er á fígging til uppseting, gummiundirlag, flisaálegging og nakað til planering.

Liðugtgerð trappur á Skúlatrød
115.000 kr. skulu til fyri at gera trappurnar á Skúlatrød lidnar.
Trapputrinini eru ikki liðugtgjørd eftir trygdarkrøvum ísv. slíka bygging. Talan er um 94 trin á 1.150 / 108.000 + 4 soylir á 5.265 / 21.060 + 1 stk avmerking trin byrja 2.000. Tilsamans 131.160,- íroknað MVG. Arbeiði er íroknað.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir
Norðoya Bú- og heimatænasta (NBH)
Stýrið fyri NBH hevur samtykt á stýrisfundi 27. februar 2023 at útvega 4.5 mió kr. Í 2023. Parturin hjá Klaksvíkar kommunu av hesum, er 3.825.000 kr. (uml. 85%).

NBH roknar við einum rakstraravlopi í 2022 millum 700 tkr. og 1,3 mió. kr. og einum íløguavlopi á 4,5 mió. kr.

Stýrið fyri NBH hevur samtykti á stýrisfundi 27. februar 2023, at ikki-brúkt-játtan skal verða verandi hjá NBH og ikki flytast kommununum aftur, men flytast fram í fíggjarætlanina 2023 hjá NBH, bæði rakstrur og íløgur.

Rakstraravlopið í 2022 ætlar NBH at brúka í 2023 til fyrireiking av dagtilhaldi norðan fyri fjall (tilmæli 23/00254), eins og at betra umstøðurnar hjá ergoterapeutunum í Ven og Virka.

Íløguavlopið í 2022 ætlar NBH at brúka soleiðis:
1) 2,0 mió. kr. til tænastudepil á Viðareiði
2) 2,0 mió. kr. til ognan av lendi til eldradepil í Klaksvík

3) 0,5 mió. kr. til dagføring av Sambýlinum á Heygnum
4) Um avlop verður, tá ið omanfyri standandi 1-3 er framt, ynskir NBH at brúka tað til útskifting av mini-bussinum á Heiminum við Vágna, ella sum ískoyti til hesa útskifting.

Um farið verður í gongd við sjálva byggingina av eldradeplinum á Viðareiði í ár, so merkir hetta, at Klaksvíkar kommuna skal játta uml 7,5 mió. kr. í 2024 og 7,5 mió. kr. í 2025.

Havna- og Vinnunevndin
Bátahylurin í Árnafirði
Neyðugt er at eykajátta uml. 3,4 mió kr. til bátahylin í Árnafirði. Orsøkin er, at veðrið og tunnilsarbeiðið hevur seinkað verkætlanini.

Tekniska nevnd
Sveisirúmið (Smiðjan)
Neyðugt er at gera eitt sveisirúmið í Smiðjuni. Kostnaður 550.000 kr.
Tað er heilsuskaðiligt hjá starvsfólki at arbeiða, sum umstøðunar eru nú. Starvsfólk í Smiðjuni tola ikki umstøðurnar/roykin, sum standast av sveisiarbeiði, tí er neyðugt at byggja út.
Víst til samtykt frá fundi í FíN 21. februar 2023.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Samlaða upphæddin í hesum eykajáttanaryvirlitinum er 28,6 mió. kr.
Um kommunan samtykkir eykajáttanir uttan meirinntøkur/sparingar/umraðfestingar, verður torførari at røkka málinum at koma undir skuldarmarkið í 2024. Tað er týdningarmikið at hava í huga fíggjarligu avleiðingarnar fyri 2024 og 2025.

Tilmæli:
Við hesum verða eykajáttanirnar lagdar fyri avvarðandi nevndir til viðgerðar og støðutakan, og samlaðu eykjáttanirnar verða lagdar fyri fíggjarnevnd og býráð til viðgerðar og støðutakan.

Heilsunevndin 13. mars 2023:
Málið hevur verið til kunningar, dagfest 13-03-2023.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. mars 2023:
Ein meirluti GvK, OáL ASB og SVJ, vísir til avseting á 10 mió.kr. og inntøku á 12 mió.kr. og tekur írestandi 4 mió.kr. til viðgerð seinni í ár.
Ein minniluti, JS tekur støðu tá samlaða heildaryvirlitið er tøkt.

Mentanarnevndin 14. mars 2023:
Ein minniluti JC og GvK tekur undir við at framflyta játtaninar til Hitavekslari kr. 630 t. Hornaskýlið kr. 2,1 mió. Dipparaneystið kr. 400 t. Rennibreytin kr. 0.
Ein minniluti ÓML og SVJ taka støðu í býráðnum.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 14. mars 2023:
Ein minniluti, EYÓP og JCC, tekur undir við at kr. 400.000 verða fluttar fram til uttanumøkið til dagstovnin Fjallafípuna.
Ein minniluti, JS og TJL, tekur støðu tá samlaða heildaryvirlitið er tøkt.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 14. mars 2023:
Ein minniluti, GVK og JCC, taka undir við at framflyta kr. 1.200.000 til tænastudepilin á Viðareiði, kr. 500.000 til dagføring av Sambýlinum á Heygnum og kr. 0 til ognan av lendi til eldradepil í Klaksvík.
Ein minniluti, SVJ og ÓML, taka støðu í býráðnum.

Havna- og Vinnunevndin 15. mars 2023:
Ein meirluti ASJ, EyÓP, og OáL tekur undir við at 3,4 mió.kr. verða fluttar fram undir Grein 7.
Ein minniluti ÓML og TL tekur støðu tá samlaða heildaryvirlitið er tøkt.

Tekniska Nevnd 15. mars 2023:
Ein meirluti OáL, EyÓP, ASJ tekur undir við at framfyta játtanir Smiðjan/sveisirúm tkr. 550 og vegur/íløgur tkr. 500.
Ein minniluti ÓML og TL tekur støðu tá samlaða heildaryvirlitið er tøkt.

Fíggjarnevndin 21. mars 2023:
Ein meirluti KHJ, ASJ, OáL tekur undir við yvirlitinum yvir eykajáttanum mars 2023, kr. 9.680.000,00.
Ein minniluti JS og SVJ tekur undir við yvirlitinum yvir eykajáttanum mars 2023, treytað av at avsetingin til Gloria verður hækkað við kr. 200.000,00.

Klaksvíkar Býráð 23. mars 2023:
Annika S. Biskopstø luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.

Atkvøtt varð um minnilutatilmælið frá FíN 21-03-2023; tað fall við 3 atkvøðum fyri (JS, SVJ og TÓS) og 5 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, OáL, EÓP og JCC); GvK og ÓML atkvøddu ikki.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá FíN 21-03-2023; tað varð einmælt samtykt.

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI

32/23
21/01331-56 Vinnuútstykkingin undir Hamri

33/23
21/01280-153 Arbeiðstakarasáttmáli

Fundurin lokin kl. 20:30